gult cyan magenta svart



# Eimskip hevur frígoymslu

*Fyrsta frígoymslan í Føroyum er í pakkhúsinum hjá Eimskip á Eystaru bryggju í Havn*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Fyrsta frígoymslan í Føroyum varð skipað í pakkhúsinum hjá Eimskip á Eystaru Bryggju í Havn í januar. Skipanin lættir væl um hjá teimum, sum innflyta og selja víðari**

INNFLUTNINGUR

Nú ber til at leggja vørur á frígoymslu í Føroyum. Eimskip hevur gjørt eina slíka í pakkhúsinum á Eystaru Bryggju í Tórshavn.

Tað eru fleiri fyrimunir við eini frígoymslu. Vøran kann flytast inn og leggjast á goymslu, uttan at neyðugt er at leggja pening út fyri avgjøld so sum mvg og møguligan toll. Og tað verður eisini væl minni av pappírsarbeiði, tá vøran í veruleikanum bara skal avgreiðast einaferð heldur enn fleiri ferðir.

Frígoymslan virkar á tann hátt, at eitt felag flytir eina ávísa vøru til Føroya og leggur hana á goymsluna. Har kann hon so liggja avgjaldsfrí, til tann, sum skal brúka hana, fer eftir henni. Tá so er, verður tað brúkarin, sum loysir vøruna út, og innflytarin ella seljarin, sleppur undan tí pappírsarbeiði sum stendst av at tollgreiða vøruna og síðan selja hana aftur.

Frígoymslan kann eisini koma teimum til góðar, sum ikki hava nógv goymslupláss. Har ber til at hava vøruna liggjandi ótollgreidda í upp til trý ár.

Møguleikin fyri frígoymslum hevur verið til staðar eina tíð, men eingin hevur tó tikið stig til hetta, fyrr enn nú, Eimskip hevur sett eina slíka á stovn.

Tað krevur tó, at ávísar reglur verða hildnar, um ein skal hava eina frígoymslu. Loyvi skal fást bæði frá Landsstýrinum og Toll- og Skattstovuni. Toll- og Skattstovan hevur eftirlit við tí, sum kemur og fer um eina slíka goymslu.

**ej**

# A P Møller flaggar føroyskt

**Eitt av feløgunum í A P Møller konsernini, Esvagt, hevur saman við Thor í Hósvík gjørt felag, sum fer at reka vaktartænastu í samband við oljuvinnuna**

*Bjarne Hansen er nevndarformaður í Svitzer, sum eigur Esvagt, ið nú hevur stovnað felag saman við Thor í Hósvík*

*Mynd: Edvard Joensen*

TÆNASTUVINNA

*Edvard Joensen*

Danska felagið Esvagt í Esbjerg, sum er partur av A P Møller konsernini, hevur saman við Thor í Hósvík stovnað felag at reka vaktarhald við boripallar undir Føroyum.

Tað er A P Møller felagið Svitzer, sum eigur Esvagt. Nevndarformaðurin í Svitzer, Bjarne Hansen, sigur, at teir hava valt at fara undir samstarv við føroyingar við tí fyri eyga at sleppa upp í art, tá føroyska oljuvinnan av álvara byrjar.

Saman við partafelagnum Thor í Hósvík, sum millum annað eigur vaktarskipið Tórsvík, hevur Esvagt stovnað partafelagið Esvagt/Thor, sum fer at røkja vaktartænastu við boripallar undir Føroyum.

Bjarne Hansen sigur, at nýggja felagið hevur eina avtalu, sum so gott sum er í pottinum. Hann vil tó ikki siga, hat oljufelag talan er um, sum skal leiga skipið, sum Esvagt/Thor fer at hava siglandi undir føroyskum flaggi.

Skipið hjá felagnum er nýggja vaktarskipið Esvagt Connector, sum verður skrásett í Føroyum og fer at sigla við føroyskari manning.

Felagið Svitzer, sum eigur Esvagt, er gamalt felag., Tað er stovnað í 1833 og seinni yvirtikið av A P Møller. Svitzer hevur í dag 70 skip alt í alt. Tey eru skrásett í dóttur felløgum í Svoríki, Bretlandi og Danmark, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður.

# Fekk stóran skaða

*Tær báðar kvinnurnar, sum vóru í hesum bilinum, vórðu fluttar á Landssjúkrahúsið við smærri snuddum*

**Tríggir bilar vóru uppi í ferðsluóhappi við Streymin hóskvøldið. Tvær eldri kvinnur vórðu fluttar á Landssjúkrahúsið**

ÓHAPP

*Eyðun Klakstein*

Hóskvøldið nakað fyri klokkan sjey hendi álvarsligur samanstoytur við Streymin.

Tríggir bilar vóru við í óhappinum, og tvær kvinnur, sum vóru í eina bilinum, vóru fluttar á Landssjúkrahús við smærri snuddum.

Tær báðar kvinnurnar, sum eru um seksti ára aldur, vóru í bili sum var á veg suðureftir.

Bilurin hjá teimum gleið í nógv hálkuni og kom yvir í mótkoyrandi breytina. Fyrst koyrdi bilurin inn í bilverjuna, og síðani rendi hann inn í mótkoyrandi bil.

## Hálkan var orsøk

Ein triði bilur, sum eisini var á veg suðureftir, varð eisini raktur.

Bilurin, sum tær báðar kvinnurnar vóru í, fekk stóran skaða, meðan hinir báðir bilarnir fingu minni skaða.

Løgreglan í Havn sigur, at tað var sera hált hóskvøldið, og at tað var hálkan, sum var orsøkin til óhappið við Streymin.



# Prixið í Vágarnar

**Seinasta innleiðandi umfarið í Prix Føroyum verður í Miðvági leygarkvøldið**

PRIX FØROYAR

*Eyðun Klakstein*

*Seinastu tveir bólkarnir, sum sleppa við í finaluna í Prix Føroyum, skulu finnast leygarkvøldið. Seinasta vikuskiftið vann All that Rain kappingina í Klaksvík.*

*Mynd: Robert Waagstein*

Seinastu tveir bólkarnir, sum fáa høvið at luttaka í finaluni í Prix Føroyar, verða funnir í Miðvági leygarkvøldið.

Tá verður seinasta av fýra innleiðandi kappingum, og 10 bólkar verða við í hesi kappingini.

Best kenda navnið í hesi kappingini er Tangz úr Havn, sum fyri tveimum árum síðani vóru í finaluni í somu kapping.

Tangz hevur verið nakað frammi síðani seinastu Prix Føroyar kappingina, og teir hava eisini verið nógv at hoyrt við lagnum »Undir somu dýnu«.

## Vágamenn royna seg

Yst er nýggjur bólkur, sum er mannaður við fólki sum Niels Una Dam, Jónas Bloch Danielsen, Eyðfinn Drewsen og Onnu Kristin Bæk, sum var ein av sangarunum í sangleikinum Skeyk.

Eisini í øðrum bólkum – sum kanska ikki eru so kendir av navni – eru tónleikarar, sum hava spælt við í kendari bólkum.

Vágamenn eru eisini væl umboðaðir í lokalu kappingini, og bólkarnir Masha, MMM, Ahou og Mas skulu royna at spæla seg í finaluna. Í hesum bólkum eru tónleikarar, sum áður hava spælt í bólkum sum Arrestment, Bimbs og Arrival.

## Seinastu plássini

Seks finalistar eru longu funnir til stóru finaluna, sum verður í Norðurlandahúsinum í apríl mánaði.

Bólkarnir eru Týr, Clickhaze, Flux, I am, All that Rain og Tám, og leygarkvøldið verður sostatt greitt, hvussu øll plássini í finaluni verða mannað.

Undan kappingini í Klaksvík seinasta vikuskiftið settu fyrireikararnir forboð fyri, at glasfløskur kunnu takast við til tiltakið, og hetta forboð verður eisini galdandi í Vágum. Prix Føroyar í Miðvági byrjar klokkan 21.00.

# Heilsa í nýggjum búna

**Mánadagin tann 26 februar 2001 lat Heilsa, sum liggur inni í SMS, upp í størri og umvældum hølum**

*Oda Ellingsgaard*

Heilsa er ein gamal handil. Tey, sum reka hann nú, yvirtóku hann í 1974, tað vil siga at handilin er meira enn 27 ára gamal. Men nú tá ið handilin er umvældur, er hann sum nýggjur.

Handilin er sera nógv broyttur. Hann er størri, ljósari, frískari og sær nógv ruddiligari út.

Grundin til at eigararnir valdu at umvæla var, at handilin heilt einfalt var alt ov lítil. Tey hava tosað um at umvæla líka síðani 1998, og ikki fyrr enn nú 3 ár seinri varð avgjørt at fara í gongd við umvælingarnar.

Eftir at handilin er blivin umvældur, eru tað nógv betri umstøður hjá arbeiðsfólkinum at vera í og at arbeiða í. Tey hava nógv betur pláss, og handilin er rúmligari at vera í nú. Arbeiðsfólkini eru heilt ómetaliga glað fyri umvælingarnar og eru sera væl nøgd við handilin, sum hann er nú.

Men umvælingarnar hjá Heilsu hava havt við sær, at ein annar handil mátti flyta í onnur høli í býnum. Gamli videohandilin Top Shop, sum hevur ligið við síðuna av Heilsu inni í SMS, er nú burtur, og Heilsa hevur fingið teirra pláss. Tað eru óivað nógv, sum halda, at hetta er sera keðiligt. Men fyri Heilsu er hetta bara gott, tí at tey manglaðu pláss, og tað hava tey fingið frá Top Shop.

Hetta er tann fyrsta vikan, Heilsa hevur opið, og tað eru sera nógv fólk, sum hava vitjað handilin í nýggju hølunum. Arbeiðsfólkini hava haft nógv at gera við at hjálpa kundunum, fylla upp á hyllarnar og prísa allar vørurnar.

Tey merkini sum Heilsa leggur mest dent á eru sikkurt Lancome, Bioterm og Helena Rubinstein. Hetta eru sera góð og dýr merki. Men nú er Heilsa farið undir at selja øll hesi merkini fyri danskar prísir, tað vil siga at øll hesi dýru merkini eru blivin bíligari, og hetta kann bara verða gott fyri viðskiftafólkini.

Eisini hevur Heilsa nógv góð upplatingartilboð, t.d. allar Matas vørurnar, sum eru í Matas blaðnum, fara fyri danskan prís og sjálvandi so eru eisini nógvar aðrar vørur, sum eru uppá tilboð.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 165.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI (Sýnaður 10-00)
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 62.600,-

PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 128.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 08-03-89
Km.: 250.000
Prísur: 36.600,-

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN
Skrás.: 14-04-00
Km.: 27.000
Prísur: 142.600,- Garanti**

RENAULT MEGANE 1,6 3 HURDAR (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 22-05-96
Km.: 100.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 11-08-98
Km.: 17.000
Prísur: 132.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

CITROEN XANTIA DIESEL (Sýnaður 10-00)
Skrás.: 01-06-95
Km.: 266.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur:124.600,- Garanti**

SUZUKI ALTO 1,0
Skrás.: 09-04-97
Km.: 46.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI
Skrás.: 09-10-95
Km.: 173.000
Prísur: 65.600,-

CITROEN BX DIESEL
Skrás.: 01-11-88
Prísur: 25.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur:114.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,8 DIESEL (Sýnaður 01-01)
Skrás.: 16-08-91
Km.: 134.000
Prísur: 42.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 06-08-90
Km.: 229.000
Prísur: 38.600,-

MAZDA 323 (Sýnaður 07-00)
Skrás.: 29-04-87
Km.:168.000
Prísur: 18.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA V/KASSA & LYFT
Skrás.: 15-05-00
Km.: 2.800
Prísur: 290.600,- Garanti**

TOYOTA DYNA V/LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 105.000
Prísur: 90.600,- Garanti*

www.reyniservice.fo

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

STØKK INN Á GÓLVIÐ

Sosialurin - 211820